Fótin undir egið borð

Magni Laksáfoss
Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum

Tá vít føroyingar skulu byggja okkara egna hús, er tað fyrsta vit gera, at tryggja okkum at vit hava nóg mikið av peningi til at klára at gjalda skuldina aftur og at avlop er eftir føstu útreiðslurnar eru goldnar. Vit skulu jú klára dagligu útreiðslurnar til mat og klæði. Vit ansa væl eftir ikki at seta okkum fyri meiri enn at vit kunnu gjalda rentur og avdráttir og samstundis liva eitt virðiligt lív, eftir at vit hava fingið fótur undir egið borð.

Fráfarandi landsstýri hevur fokuserað so einvíst eftir at skera eina av mest týdningarmiklu inntøkunum hjá landinum niður – ríkisveitingin frá danska statinum – at teir als ikki hava tryggja sær eina rímiliga uppsparing og eina rímiliga inntøku, áðrenn teir fóru i holt við projektið.

Teir kalla tað fyri at fáa "fótin undir egið borð" og "vera harri í egnum húsi", men hvussu ætla teir at tryggja sær at vit ikki missa húsið?

Uttan pengar – einki hús!

Vit vita øll, at um vit ikki eru førd fyri at gjalda okkara skuld, verða vit sett út á gøtuna. Vit verða sett út úr okkara egna húsi – bankin tekur okkara heim. Í besta fori fáa vit loyvi til at vera búgvandi í húsunum, men eru sett undir administratión av bankanum.

Tað er av alra størsta týdningi, fyrst at tryggja sær at man hevur neyðugu inntøkuna, áðrenn man velur at fara so drastiskt til verka, sum fráfarandi landsstýri hevur valgt at fara. Tað er ábyrgdarleyst at skera ríkisveitingina niður, uttan at tryggja sær aðrar inntøkur fyrst.

Soleiðis høvdu teir ikki borið seg at í egnum húsi

Eingin trygd er fyri, at tann peningurin, sum vit skulu brúka fyri at klára dagligdagin, er til staðar um nøkur fá ár. Fiskivinnan hevur altíð verið ein óstøðug inntøkukelda og alivinnan er javnan úti fyri sjúkum og øðrum vannlukkum.

Tað er ein sera ábyrgdarleysur politikkur, har man velur at skera eina inntøku burtur uttan fyrst at hava tryggja sær, at man kann vera henni fyri uttan. Slíkt vildi teir nokk aldrin funnið uppá, tá teir sita í egnum húsi og skulu gjalda rokningarnar har. Teir høvdu sjálvandi tryggja sær at teirra inntøkur vóru passaliga stórar til at teir kunnu klára útreiðslurnar, ella høvdu teir minka um útreiðslurnar, soleiðis at teir kundu verið inntøkuni fyri uttan.

Eingin maður við virðing fyri sær sjálvum sendi rokningina til ein annan

Fráfarandi landsstýri hevur, sum tað síðsta teir gjørdu í teirra valskeiði, skorið ríkisveitingina niður við 366 mió. kr., væl vitandi um, at teir ikki koma til at sita við rokningini og neyðugu sparingunum.

Soleiðis gera menn við virðing og ábyrgdarkenslu ikki!

Ein maður við virðing, fer ikki og tekur slíkar stórar avgerðir fyri búskapin, væl vitandi um at hann ikki hevur hugsa sær at sita við rokningini, men bert lata hana viðari til næsta mann í stólinum.

Um man ynskir at gjøgnumføra tílíkar stórar broytingar, eigur man at vera ábyrgdarfullur nokk til sjálvur fyrst at fremja tær sparingar, sum skulu til fyri at tryggja fólkinum góð livikor eftir at broytingarnar eru framdar.

Broytingar, sum koma at merkjast nógv ættarlið framm í tíðina.

Tað nyttar ikki at spæla hasard við einum heilum samfelag við 47.000 íbúgvum. Vit skulu byggja á tryggar og haldgóðar loysnir, sum fólkið er saman um. Vit skulu taka tað tíðina sum skal til, fyri at tryggja okkum inntøkur, sum skulu koma í staðin fyri skerjingar í ríkisveitingunum.

Eitt mentunarval

Signar P. Heinesen

Val er í hondum og vit, sum skulu velja, gera okkum so smátt til at meta um, hvat kom burturúr hesum valskeiðinum, og hvat vit vilja skal henda í tí komandi.

Vit eru borgarar í tí lítla partinum av heiminum, sum hava demokratisk rættindi. Við søguligum eygum eru hesi demokratisku rættindi eisini so nýggj, at vit enn gera rætt í at handfara hesi rættindi sum tað, ið kann gleppa okkum av hondum.

Veljarin hevur tí onga umbering fyri ikki at røkja hesi rættindi eftir førimuni. Løgtingsvalið er mest týðandi stakhending í demokratisku skipanini, og er tað tí góður demokratiskur siður, at tann einstaki veljarin gevur sær stundir til at hugsa seg um, minna seg á tað, sum farið er og líta framyvir - hvar vil eg geva mítt demokratiska íkast?

Hetta valskeiðið

At sjálvstýrið føroya fólks hevur myndað yvirskriftir og røður hetta valskeiðið, er einki nýtt. Hóast nógv rok av ymsum slagi, so eru tey ítøkiligu úrslitini til at yvirskoða. Vit eru ikki nærri eini politiskari niðurstøðu í málinum, har nakar greiður meiriluti av Føroya fólki er fyri ella ímóti at taka sjálvstýri innanfyri eitt ásett áramál, hóast væl tey flestu helst kundu hugsað sær eitt sindur víðari ræsur. Onkur roynir at ugga seg við, at ein sjálvstýrisprosess er farin á glið og steðgast ikki aftur. Men veruleikin er, at tann helvtin av løgtinginum, sum argumenterar við skattapengunum hjá donsku frú Jensen, er eisini fólkavald.

Mentunarliga var støðan ikki serliga góð, tá ið hendan samgongan tók við. Men hendan samgongan hevur ikki bøtt um støðuna - heldur hinvegin. Í atgerðarloysi vegna tað eina málið fyri framman var hugsað ov lítið um mentunarligu fylgjurnar av øðrum málum, sum ofta koma undir heitið 'smámál'. Sum eitt lítið innskot kann nevnast, at framtíðargranskarar sjáldan brúka tíð uppá stórmálini - tað eru úrslit frá nøkrum av dagsins smámálum, sum koma at mynda stórmálini í morgin.

Tað eru serliga tvey eyðkenni, sum eiga at ávara okkum, sum velja.

Ósannindi

Tað eina eyðkenni, sum eigur at ávara okkum veljarar, eru tey ósannindi, sum oftari og oftari koma frá okkara ovastu politisku leiðslu.

Verandi stýrisskipan er eitt tvíeggjað svørð, sum vit veljarar eiga at taka í fullum álvara. Hendan stýrisskipanin byggir á ta einu høvuðsfortreytina, at øll í almennum starvi, frá høgum til lágan, siga sum er og siga tað, sum er týðandi í málinum. Er onkur, sum tilætlað smoykir sær uttanum hetta, so eigur tað at fáa avleiðingar alt fyri eitt. Verður hetta ikki tikið í álvara, so er okkara stýrisskipan ein einarædisskipan. Endalyktin er tað totalitera.

Hvussu ofta hava ikki bæði landsstýrismaður og hægstu embætisfólk hansara sagt beinleiðis ósatt ella borið mál soleiðis fram, at tann viðkomandi parturin tilætlaður er skúgvaður til viks? Dømið við einum av hægstu embætismonnum landsins, sum nú um dagarnar var í fjølmiðlunum við ósannindum fyri aðru ferð í sama máli at kalla, stendur ikki einsamalt í so máta. Tað er tekin um eina undirmáaða mentan, at bæði landsstýri og løgting góðtaka ósannindi.

Tann, sum brúkar ósannindi í síni talu og ósanna atferð, hevur meldað seg sjálvan úr samskiftinum við onnur og lítið felags gagn er í tí, sum viðkomandi tekst við. Tann alment setti, sum brúkar ósannindi í síni talu og ósanna atferð, forðar harafturat veljaranum í sínum politiska dómi og er tí sekur mótvegis einum av hornasteinunum í praktisku demokratisku skipanini.

Ikki-politikkur

Hitt eyðkennið í okkara stýring er vantandi evni og vilji til at gera tað politiska arbeiðið til lítar og grundað á hetta arbeiðið at fáa undirtøku fyri tí, sum verður avgjørt. Ein politisk avgerð, sum ikki hevur eina veruliga undirtøku, er ikki-politikkur, sum er trýstur ígjøgnum politiska formalitetin, serliga tá ið talan er um bygnaðarmál. Slík mál hava ongan týdning í sær sjálvum, men eru avgerandi fyri hópin av øðrum málum. Kommunuskipanin er dømi um slíkt mál.

Júst kommunuskipanin er eitt av dømunum, har tað politiska arbeiðið so at siga steðgaði upp. Ongin breið tilvitan er fingin til vega í fólkinum um, at færri og større kommunur eru til størri gagn enn fleiri smáar kommunur, hóast mong í fyrisitingini og kanska eisini fleiri politikarar halda, at so er. Tá ið so ongin tilvitan fæst, so verður málið trýst ígjøgnum við at leggja størri og størri byrðar á kommununar, soleiðis at tær noyðast at leggja saman. Tað gera tær so - sum best ber til. Tað ítøkiliga úrslitið er, at vit neyvan nakrantíð hava havt ógreiðari býtið millum land og kommunur. Vit kundu nevnt onnur dømi, har politiska skipanin roynir at smoykja sær uttanum veljaran, eitt nú innan skattaskipanina, sjálvstýristilgongdina, fíggjarlógarviðgerðina o.s.fr.

Sagt við øðrum orðum, so eru vit við at koma okkum í eina 'vit látast sum um' skipan, sum hevur lítið við skilagóða atferð at gera - enn minni við demokratiska atferð - og uppaftur minni hevur tað við mentaða atferð at gera. Hetta er ikki so mikið, sum frægasti mátin at fáa avgerðir praktiskt gjøgnumførdar.

Ein spurningur um mentan

Hesi málini eru um mentan. Gerandismentan, sum næsta ættarlið fer at skriva bøkur um. Málini snúgva seg um, hvussu vit eru mótvegis hvør øðrum, hvussu vit skipa okkum innanhýsis og í okkara livibreyðí og hvussu okkara leiðsla virkar undir trýsti. Tað er mentanin, orðið, sum ger skilnaðin millum djór og menniskju, millum frumskógina, har tann sterkasti vinnur og fólkið, har felagsskapurin er kjarnin.

Mentan ger munin. Menniskjan hevur ymiskar møguleikar, sum djórini ikki hava. Menniskjan hevur t.d. eisini møguleikan, at planta eina frumskóg, har tann veikasti vinnur. Tá fáa vit eina doyggjandi mentan. Ein slík gongd er eyðkend m.a. við loysnum, sum verða settar í verk, hóast tær vóru framskygdar fyri áratíggjum síðani og tíðin nú er farin frá.

Tað er mentanin, sum ger av, um vit skipa okkum soleiðis, at sum frægast fæst burturúr tí einstaka borgaranum - og at hvør einstakur fær sum frægast burturúr tí tilveru, sum honum var lagað, saman við sínum medborgarum. Tað er mentanin, sum ger av, um vit heldur skipa okkum soleiðis, at tað veikasta vinnur frama í tí einstaka, og vit harvið máa undan 'sam'-felagnum og fáa hissini menniskjaoyggjar, har títt problem ikki er mítt problem - ein gongd, sum er felagsskapinum at bana.

Tað er ikki stórvegis íkast eitt lítið land sum Føroyar kann geva í einum víðari høpi, men mentaða atferð og góðar demokratiskar siðir hava vit natúrligar fortreytir at geva. Sum veljari anno 2002 verður mítt demokratiska íkast at velja mentan. Ynski mítt er at fáa høvi at velja ein mentaðan persón í einum rímiliga mentaðum flokki, har teir ítøkiligu persónarnir í flokssleiðsluni arbeiða rímiliga mentað millum sínar medborgarar.

Foreldur ella ikki?

Gunnar K Nattestad

Tá ið eitt barn er føtt eru vanliga tvey foreldur at barninum. Fyrr vóru bæði ið vóru upprunin til barnið, sum oftast gift og høvdu væl gjørt sær nakrar tankar hesum viðvíkjandi; m.a. vóru samd um at æla barnið upp saman og geva tí tað ið tørvur var á. Hettar umfataði so allar tær útreiðslur ið natúrliga fylgja við.

Tíðirnar broytast og soleiðis hevur eisini verið á hesum økinum. Seinastu árini er uml. helvtin av børnunum í Føroyum fødd uttanfyri hjúnarlag. Tað er upp til ein og hvønn at taka støðu til hvørjar rammur man ynskir at geva samlívinum, m.a. tá tað kemur til børn og uppæling av hesum, men í løtuni vísir tað seg at vera almennur politikkur at diskriminera hjúnarlagi. Hettar verður gjørt á fleiri økjum og skal eg nevna nøkur.

Barnapengar er gjald ið annað forelduri skal gjalda til forelduri ið hevur foreldramyndugleikan.

Sum nevnt í byrjanini, so avhalda foreldur ið eru gift/búgva saman, allar útreiðslur ið viðkoma barninum. Men tað foreldri ið ikki hevur foreldrarættin, kann í dag draga 50% av barnapengunum frá í skatti, so at mánaðarliga gjaldið pr. barn endar niðri á uml. 350 kr. Hvussu nógvar dagar hesir pengar røkka at forsyrgja einum barni, skal vera upp til hvønn einstakan at hugsa um.

Also um tú skilist ella ikki giftist, so sleppur tú fyri hálvan prís.

Hettar er eisini galdandi á øðrum øki. Barnaansing vísur seg at vera ein samfelagsuppgáva í dag. Her kann tann (á pappírinum) einligi forsyrgjarin, fáa fleiri fyrimunir, m.a. frítt ansingarpláss, stuðul til bústað, forsorg o.a. ið ein giftur als ikki kann gera krav uppá uttan at støðan hjá makanum verður tikin við. Hettar seinna er sum so í lagi, men tað skeiva er at mong ið skula eitast at vera stakir forsyrgjar, í veruleikanum búgva saman við einum ella øðrum. Tey eru bara ikki gift.

Tað eru fleiri ið soleiðis misbrúka tað, ið upprunaliga vóru vælmeintar skipanir, men sum við broyttum lívsstíli eru vorin beinleiðis og óbeinleiðis stuðul til leyslevnað og ábyrgdarloysi. Her er tað seliga vit menn ið mangan eru meistarar í ábyrgdarloysi. Kærleikin røkkur mangan ikki út um songarstokkin og eru tað mangar syrgiligar mannalagnur ið liggja undir fyri hesum.

Nú er tíð uppá at vit fáa brott hettar so at hjúnalagi í okkara sokallaða "kristna landið", kemur í minsta lagi uppá sama støði sum aðrir samlívsformar ella mangul uppá sama. Tá fólk renna undan ábyrgd, má samfelagi í minsta lagi syrgja fyri at tey gjalda tað, tey annars skuldu goldið.

Fupp og fakta

Leivur Hansen,
Tjóðveldisvalevnt í Suðurstreymi

At fólkaflokkurin stúrir fyri fólksins dómi tann 30. apríl, er bæði týðuligt og væl skiljandi.

Soleiðis sum flokkurin hevur hóreiggjað sær í hesum valskeiðnum, hevur hann snøgt sagt ikki nakað gott í væntu.

Í fullveldismálinum hevur hann rætt og slætt ikki livað upp til álitið, men hevur ístaðin ligið og rikist sum bukka millum sengur.

Tað kann hann sjálvandi ikki krevja at fáa nakra mjúka viðferð fyri "dómadagin"!

Sokallaða "skattalættauppskotið", sum hann so ósmæðin risti úr ermuni nú um dagarnar, økir ikki júst heldur um umdømi hansara, soleiðis sum viðmerkingarnar higartil heldur ikki benda á.

Fólk kenna jú mun á fupp og fakta!

Ei undur í, at teir hvørki vita út ella inn, nú sjálvt andstøðan eisini hevur vent teimum og paraduuppskoti teirra bakið.

Vit fullveldisfólk kunnu av røttum fegnast um, at tað ikki varð fólkaflokkurin men tjóðveldisflokkurin, ið fekk figgjarmál at umsita í hesi samgonguni.

Annars hevði verið galin endi við brestin, tað er eyðsæð.

Størsti vandin í føroyska búskapinum er, at figgjariga skilið verður slept og samfelagið verður blást um koll.

Tað fer at elva til prishækkingar á øllum økjum, at reallønin verður útholað, at vit brúka meira enn vit tjena og at vit nærkast nýggjari kreppu.

Tjóðveldisflokurin vil:

- Reka ein varnan og ábyrgdarfullan búskaparpolitikk
- Raðfesta sosialu trygdina hægst
- Halda seg til langtíðarætlanir fyri íløgur
- Brúka Búskapargrunn Føroya sum amboð at tryggja komandi ættarlið.

Tjóðveldisflokkurin er trygdin fyri, at búskaparliga skilið verður hildið.

Fyrispurningur til stjóran á Føroya Tele

Sune Jacobsen

Í fimmaranaum í vikuni varð tosað um samstarvið millum Føroya Tele og Tórshavnar Býráð um at senda víðari ymiskar útlendskar sjónvarpsrásir. Sagt var, at fólk í Havnini, Skálafjørðinum og Klaksvík kom at síggja hesar í fyrstu atlogu.

Tá lurtararnir høvdu høvið at ringja inn, spurdi ein við navninum Niels Absalonsen á Viðareiði, um Føroya Tele ikki hevði skyldu at veita øllum landinum somu tænastur. Tá svaraði stjórin, Andras Róin, at partafelagið, sum bara hevur almennan partapening, ikki hevði veitingarskyldu av hesum slagnum.

Eg ivist ikki í tí at stjórin hevur rætt, men tá sendingin var liðug fór eg at leita í løgtingsmálum, um gongdina, tá TFL varð gjørt til partafelag. Har fann eg m.a. løgtingslógini um fjarskifti, og sambart § 1. í hesi lóg stendur : Endamálið við lógini er, at javngóð fjarskiftistænasta verður veitt um alt landið til somu treytir. Og í § 2 stendur, hvat orðið fjarskifti merkir. Tað merkir flyting, sending ella móttøka av tekni, signali skrift, mynd , ljóði o.s.fr.

Út frá hesi lógini skuldi so Føroya Tele havt veitingarskyldu til alt landið. Undir viðgerðini av hesum málinum í tinginum varð eisini tosað um internetsambandið Tá var tað nevniliga soleiðis, at partar av landinum ikki kundu hava fast internetsamband, men bert uppringt samband. Og eg síggi í álitinum til fjarskiftislógina, at Mentannarnevndin sigur: Eisini er nevndin vorðin samd um at heita á landsstýrið um at virka fyri, at treytirnar fyri sambandið um Internetið verða tær somu á øllum støðum, sum eru digitaliserað, og annars at virka fyri, at allar Føroyar verða digitaliseraðar skjótast til ber.

Og sambært § 8 í somu lóg er heimilað landsstýrismanninum at veita konsessión til fjarskifti. Og hesa konsessión hevur Føroya Tele sjálvandi. Í staðin fyri at gita nakað sum helst, fari eg at spyrja stjóran, Andras Róin, hvussu tað ber til, at Føroya Tele ikki hevur veitingarskyldu til alt landið. Eg og fleiri onnur høvdu verið takksom, um tú kundi svarað.

Viðv.: umskipan av Føroya Lívstrygging

Vegna samtakið og feløgini
Gunnleivur Dalsgarð

Vit hava noterað okkum niðurstøðuna hjá landsstýrismálanevndini mikudagin tann 21. februar 2002, og er tað nokk ikki nógv vit kunna gera við hesa.

Tó loyva vit okkum fyri góðan ordans skuld at viðmerkja fylgjandi:

Í skrivinum bleiv landsstýrismálanevndin biðin um at taka støðu til skrivliga upplýsing frá landsstýrismanninum um, at gjørdar vóru nágreiniligar løgfrøðiligar kanningar av rættarligu støðuni hjá Føroya Lívstrygging og at niðurstøðan var greið nevniliga, at Føroya Lívstrygging er ein partur av almennu fyrisitingini, sum ein serligur fyrisitingarligur stovnur, og eigur landsskassin eginognina í stovninum.

Hendan upplýsingin hjá landsstýrismanninum er ikki rætt, tí løgfrøðiligu kanningarnar koma til hvør sítt úrslit.

Vit meta ikki, at landsstýrismálanevndin hevur tikið støðu til hendan upplýsingin frá landsstýrismanninum og hevur sostatt ikki svarað tí sum feløgini spurdu um við skrivi frá 05.. juli 2001.

Hinvegin sæst, at landsstýrismálanevndin ger nógv burturúr at løgtingið er upplýst um, at ivi hevur verið er um rættarstøðuna hjá Føroya Lívstrygging. At ivi var um rættarstøðuna hjá Føroya Lívstrygging og at hetta er upplýst løgtinginum, er púra rætt. Hetta verður longu gjørt í skrivligu viðmerkingunum hjá landsstýrismanninum til uppskotið um løgtingslóg um umskipan av Føroya Lívstrygging, har hesin á síðu 3 upplýsir, at ivamál hevur verið um rættarligu støðuna hjá Føroya Lívstrygging. Sostatt er einki nýtt í, at tað hava verið ivamál um hendan spurning og at hettar er upplýst løgtinginum. Tað vistu vit áðrenn vit kærdu. Tað er heldur ikki hetta ið kært verður um.

Tað bleiv kært um, at landsstýrismaðurin upplýsir, at løgfrøðiligu kanningarnar vísa, at niðurstøðan er greið. Vit duga ikki at síggja, at løgtingið eftirfylgjandi, í samband við viðgerð av málinum, nakrantíð fær upplýst, at niðurstøðan hjá løgfrøðiligu kanningunum tvørturímóti koma til hvør sítt úrslit. Sostatt hevur løgtingið frá landsstýrismanninum fingið at vita at løgfrøðingar koma til tað niðurstøðu at eingin ivi er um at Føroya Lívstrygging er almennur stovnur. Hendan upplýsingin, sum faktuelt er skeiv, fráboðar landstýrismaðurin skrivliga til løgtingið, og sær hesin skeivleikin ikki út til at verða rættaður eftirfylgjandi. Hendan skeivleikan tekur landsstýrismálanevndin slet ikki støðu til.

Vísandi til frammanfyri standandi, meta vit sostatt, at landsstýrismálanevndin ikki hevur svarað kæruni hjá feløgunum.

Ásannandi at tað ikki nýttar at brúka meiri tíð og orku uppá landsstýrismálanevndina í hesum máliø, skal hettar skriv ikki skiljast sum ein áheitan um uppafturtøku av málinum.

Til seinast skal viðmerkjast, at tað er undrunarvert, at Jógvan Durhuus, løgtingslimur hevur verið við til at tikið avgerð, tá ið sami maður áður hevur upplýst, at hann metti seg verða ógegnigan í málinum.